UTTANRÍKIS – OG FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Tórshavn, 26. mai 2026**
**J.nr.: 26/13710-2**

**Svar frá Bárði á Steig Nielsen, landsstýrismanni, uppá fyrispurning 52-109/2025 frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni, um støðuna hjá føroyingum í Persaraflógvanum**

*Spurningurin var soljóðandi:*

1. Hevur landsstýrið eitt yvirlit yvir føroyingar og føroysk reiðarí, ið eru innibyrgd ella á annan hátt avmarkaði í Persaraflógvanum?
2. Hvat ger landsstýrið fyri at fáa eitt greitt yvirlit yvir føroyingar og føroysk reiðarí, ið eru innibyrgd í Persaraflógvanum?
3. Arbeiðir landsstýrið við at fáa føroyingar heim á tryggan hátt, og at føroyingar ið eru verandi í økinum annars eru tryggir?
4. Verður landsstýrið kunnað um og tikið við í uttanríkis- og trygdarpolitiskar avgerðir, ið verða tiknar, ið viðvíkja stongslinum av Hormuz-sundinum – eitt nú avgerðir frá danskari síðu um at geva hernaðarlig íkast til hernaðarátøk í økinum?

**Til spurningar 1-3**
At kalla eingin skipaferðsla hevur verið gjøgnum Hormuz-sundið síðan um mánaðarskiftið februar-mars. Støðan í økinum broytist frá degi til dags, og ber í sær óvissur fyri tey mongu skip og sjófólk, sum ikki sleppa úr Hormuz-sundinum orsakað av støðuni.

Uttanríkistænastan samstarvar við danska uttanríkisráðið um mál, sum viðvíkja borgaratænastu til føroyingar úti í heimi. Í tílíkum málum er meginreglan tann, at borgarar, ið hava tørv á hjálp, ráðgeving ella øðrum tænastum venda sær beinleiðis til Uttanríkistænastuna ella til danska uttanríkisráðið. Enn er eingin fyrispurningur um borgaratænastu frá føroyingum í Hormuz-økinum skrásettur.

Landsstýrið fylgir gongdini í økinum við tí fyri eygað eftir førimuni – og í samstarvi við onnur lond í líknandi støðu – at kunna veita hjálp og ráðgeving.

Vinnumálaráðið hevur upplýst, at einki skip í føroysku skipaskráunum er í Hormuz-sundinum ella innanfyri.

Føroyskir myndugleikar hava ikki eitt samlað yvirlit yvir, hvørjum skipum føroysk sjófólk sigla við, ella hvar ið skip við føroyskum sjófólkum eru stødd.

TINGANES • P.O. BOX 64 • FO-110 TÓRSHAVN • FAROE ISLANDS
TELEPHONE + 298 35 87 00 • E-MAIL: UFMR@UFMR.FO • Homepage: www.ufmr.fo

**Til spurning 4**

Landsstýrið fær vanliga kunning um viðkomandi ætlanir hjá donsku stjórnini av uttanríkis-trygdar- og verjupolitiskum slagi. Lagt er upp til, at skuldi hesin spurningur verðið aktuellur í mun til støðuna í Hormuz-sundinum, fær landsstýrið kunning.

Uttanríkis- og fiskimálaráðið, 26. mai 2026

Bárður á Steig Nielsen,
landsstýrismaður